## Tala tínar **barnabøkur** til vaksin?

Ja, tað veit eg, at tær gera. Eg veit at í fleiri familjum, tá foreldrini lesa góða nátt søgur, klára tey ikki at leggja bókina frá sær og kom til at lesa framum. Tað síggi eg eisini á mínum fan-maili, tað mesta er frá børnum, men eg fái eisini brøv frá vaksnum.

Eg haldi, tað er ein eginleiki fantasy hevur, tað røkkur yvirum summi mørk, til dømis at aldurin ikki setur mark fyri hvør kann lesa tað.




## Skyggeporten **á føroyskum**

Nýggja bókin hjá Lene Kaaberbøl "Skyggeporten" kom út í Danmark 11. oktober.

Bókin eru um eina gentu, sum eitur Anna, og ikki dugir at tosa.

Tá Bókadeild Føroya Lærarafelags herfyri fylti 50 ár, fingu tey rættindini til at geva bókina út á føroyskum í føðingardagsgávu frá Lene Kaaberbøl. Væntandi kemur bókin út á føroyskum um umleið eitt ár.



*- Tann størsti dreymurin hjá mær, tá tað handlar um arbeiðið, er at kunna blíva við at skriva góðar bøkur og at menna meg sum høvundur. Tað er nógv meira spennandi, enn at fáa gjørt Hollywood filmar av øllum bóknum. Eg vil heldur hava fleiri søgur, sigur Lene Kaaberbøl.*

skammaraeyguni. Tað hugskotið hevði Lene hugsað um leingi, men tá hon royndi at skriva søguna um ta vaksnu kvinnuna, ið hevði hesi eyguni, gekk tað ikki so væl.

- Tað var ikki fyrr enn eg fann útav, at tað var dóttir skammarans tað skuldi handla um. Hvussu tað er at vera næstan 11 ár og hava eygu, sum eingin kann hyggja inn í. Tað var tá eg hugsaði um fylgjurnar av tí, um hvussu avbyrgdur man blívur, og at man ongar vinir hevur, tá bleiv Dina livandi, og søgan byrjaði at siga seg sjálva. Ella man kann siga, at tað var Dina, sum segði mær hana.

### Film um Dinu

Skammararøðin er nú komin út í 18 londum og er eisini komin út í USA. Har gongur tað væl við bókini, sum hevur selt tríggjar ferðir so nógv, sum forlagið hevði væntað. Tað gongur so væl, at ein filmsframleiðari vil gera ein altjóða film um dóttir skammarans. Um tvey ella trý ár er ein filmur um Dinu og familju hennara væntandi ein veruleiki.

Henda stóra viðgongd hevur sjálvandi haft eina ávirkan á Lene Kaaberbøl. Tá tað kemur til arbeiði hevur viðgongdin gjørt, at Lene hevur fingið meira sjálvsálit.

- Fyrr kundi eg ivast um tað, sum eg hevði gjørt, var nóg gott. Men nú eri eg rættiliga sannførd um, at tað, sum eg haldi virkar, tað virkar. Í dag veit eg, at tað hóast alt eru ein kvart millión fólk í heiminum, sum halda, at tað sum eg geri er gott, og so er man ikki so sárur meira.

Tað hevur eisini haft við sær, at Lene sjálv kann avgera, nær hon vil skriva, tí nú noyðist hon ikki longur at hava eitt arbeiði við síðuna av.

Persónliga heldur Lene tó ikki, at viðgongdin hevur haft ta stóru ávirkanina á hennara lív.

- Eg livi mítt lív, eg geri heilt vanlig ting. Eg gangi túr við hundunum, keypi ein hálvan litur av mjólk í keypsamtøkuni, og tað skal man eisini. Tað er tað, sum er tað týdningarmesta. Hitt blívur á ein hátt ikki so týdningarmikið. So høvuðsparturin av mínum lívi, tað sum veruliga merkir nakað, er ikki ávirkað.

### Fleiri søgur

Lene heldur, at tað hevði verið stuttligt, um filmurin um Skammaran bleiv væl móttikin í Hollywood, og at hetta gjørdi, at fólk eisini keyptu hennara bøkur. Men hon heldur, tað vera meira týdningarmikið, at kunna liva stilt og væl saman við familjuni.

- Tann størsti dreymurin hjá mær, tá tað handlar um arbeiðið, er at kunna blíva við at skriva góðar bøkur og at menna meg sum høvundur. Tað er nógv meira spennandi, enn at fáa gjørt Hollywood filmar av øllum bóknum. Eg vil heldur hava fleiri søgur.